# Linolium frá Barjamu heldur enn

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*


*Mynd: Jens Kr. Vang*

Á vetri í kavaroki í 1951 rendi farmaskipið Barjama hjá skotanum Charles Mouritsen á land Suðuri á Bø sunnandyri Kirkjubø. Skipið var givið upp og føroyingar vóru grammir av fáa fong av skipinum. Har var matur, har var whiskey, har vóru allar møguligar vørur til Føroya og har var linolium í longum banum. So nógv var til av linolium, at tað segðist, at sjálvt veðrabásarnir í Skopun vóru klæddir við vakra gólvbelegningi.

Og tað er júst linolium, sum vit hefta okkum við á baksíðuni í dag. Tí nú hava vit sjálvir roynt at gingið á hesum linolium og tað er púra óbroytt síðan og tað er enntá fjálgt at stíga á. Veðrarnir í Skopun hvødu tað gott í fimtiárunum og langt inn í seksti árini.

Og linolinum liggur á gólvinum í gongini hjá Johan Wang Niclasen í Hesti.

– Beiggi mín kom við tí og legði tað á, áðrenn hann bygdi og tað hevur roynst væl, tú sær sjálvur. Tað er heilt óbroytt, sigur Johan.

– Fyrr lá linoliumið eisini upp gjøgnum trappurnar, men har er tað ikki longur, sigur hann. Og at linoliumið hevur verið sterkt er gongin hjá Johan í Hesti gott dømi um, tí í tí húsinum hevur nógv gott fólk gingið og sitið væl.

## VEÐRIÐ


Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot upp í stívt andøvsgul av vestri og útnyrðingi. Skýggjað og vátasettingur ella kavi. Hitin um frostmarkið ella beint omanfyri. Móti kvøldið lækkar hann niður í útsynning og veksur vindin upp í ein strúk. Hitin økist nakað.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri. Skýggjað og regn. Hitin millum 2 og 5 stig. Út á seinnapartin og kvøldið hækkar hann upp í norðan og veksur upp í hvassan vind ella skrið. Tað klárar nakað í, tó við kavaælum, og hitin fellur til frostmarkið.




**Veðrið jólaaftan og jóladag:**
Strúkur í vindi upp í hvassan vind ella skrið av norði. Kavi og heglingsælingur. Hitin millum frostmarkið og 3 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 8 |
| Nuuk | 4 |
| Qaqortoq | 5 |
| Ammassalik | ÷1 |
| Saint John's | 7 |
| Halifax | ÷1 |
| Reykjavík | 5 |
| Seyðisfjørður | ÷3 |
| Tórshavn | 0 |
| Lerwick | 1 |
| Aberdeen | 4 |
| London | 4 |
| Tromsø | ÷6 |
| Bergen | 0 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | ÷12 |
| Moskva | ÷6 |
| Berlin | 4 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | ÷2 |
| Paris | 3 |
| Madrid | 6 |
| Róm | 8 |
| Malorca | – |
| Athen | 6 |
| Malta | 10 |
| Tunis | 11 |
| Beijing | 0 |
| New Dehli | 17 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | – |
| New York | 9 |
| Miami | 24 |
| Los Angeles | 14 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 29 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 33 |

## LUFTTRÝSTIÐ



Eitt hátrýst vestan fyri Írland hvørvur í ein vestan. Eitt lágtrýst beint vestan fyri Suður-Noreg fer í ein landsynning og dýpist.


Kaldur norðanvindur við kavaæli kemur síðani inn yvir oyggjarnar, men tollaksmessudag fer eitt nýtt lágtrýst av leiðunum við landnyrðingspartin av Grønlandi eystur um Føroyar móti Skotlandi.

## HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 19/12 kl. 06[00]– 20/12 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 1,1°
Minsti hiti máldur í des.: ÷10,5° Mesti hiti máldur í des.: 13,2°

## AVFALLIÐ



Avfallið: 2,0 mm – mált frá 19/12 kl. 06[00]– 20/12 kl. 06[00]
Avfallið higartil í desember: 57,8 mm


**Antennu-monteringar**
Vit avgreiða allar antennu-monteringar
- Komplettar nýmonteringar
- Útskifting og umvæling
- Felags antennuanlegg
**Fokus ELEKTRONIK**
Reynstún 19 • Argir
Tlf. 311306 • Fax 311306

**BILLUTIR**
ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
**F.A. BILLUTIR**
tlf. 421605 fax 421666


## VESTFALLSKYRRINDI

21. des.: Mánin longst frá jørðini
22. des.: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 22. des | — | 12.19 | 11.19 | 23.51 | 11.34 | — | 01.48 | 14.19 | 02.48 | 15.19 | 10.34 | 23.06 | 09.34 | 22.06 | 00.03 | 12.34 | 01.03 | 13.34 | — | 12.04 | 00.48 | 13.19 |
| 23. des | 00.51 | 13.22 | — | 12.22 | 00.06 | 12.37 | 02.51 | 15.22 | 03.51 | 16.22 | 11.37 | — | 10.37 | 23.09 | 01.06 | 13.37 | 02.06 | 14.37 | 00.36 | 13.07 | 01.51 | 14.22 |
| 24. des | 01.54 | 14.12 | 00.54 | 13.12 | 01.09 | 13.27 | 03.54 | 16.12 | 04.54 | 17.12 | 00.09 | 12.27 | 11.27 | 23.45 | 02.09 | 14.27 | 03.09 | 15.27 | 01.39 | 13.57 | 02.54 | 15.12 |
| 25. des | 02.30 | 14.48 | 01.30 | 13.48 | 01.45 | 14.03 | 04.30 | 16.48 | 05.30 | 17.48 | 00.45 | 13.03 | — | 12.03 | 02.45 | 15.03 | 03.45 | 16.03 | 02.15 | 14.33 | 03.30 | 15.48 |

5 707265 100067 >